Lesarabrøv

»Avtalað spæl«

Føroya Løgting
100 Tórshavn

Viðv. løgtingsmáli nr. 17. 1993

Vit fara í hesum máli at vísa til tað, sum vit áður hava skrivað til tingið.

Men vit vilja tó skoyta uppí:

a) Tað er alt, sum bendir á, at í hesum máli er ikki talan um at lúka eitt krav frá donsku stjórnini, soleiðis sum tað verður upplýst. Tað er neyvan ivi um, at her er talan um »avtalað spæl«. Prógvið fyri hesum er lutvíst brævið frá danska forsætismálaráðharranum, dagfest 15. mars 1993, har hesin váttar, at danska stjórnin als ikki leggur seg út í hetta mál.

Lutvíst verður víst til hjálagda skjal, sum prógvar, at tað uppskot, sum nú er lagt fram, er stórt sæð tað sama uppskot, sum var gjørt í fiskivinnuumsitingini í 1991.

Annars verður hesin spurningur kannaður nærri í sambandi við fólkatingsviðgerðina av avtaluni nú í vikuni og í sambandi við ta nevndarviðgerð, sum verður í hesum sambandi.

b) Hin spurningurin er, hvat meinast við orðalagið »Der er/var taget initiativ til revision af indtægtssikringen for fiskerne«.

Marita Petersen, løgmaður, váttar í sínum brævi, sum annars er kunngjørt í Dimmalætting 23. oktober, at einasta »initiativ« á hesum øki var broyting í lógini viðvíkjandi útróðrarmonnum.

Tað einasta »initiativ«, sum annars kann sigast at vera hent á hesum økinum, er tað uppskot, sum fiskivinnuumsitingin gjørdi í 1991. Men her hendi tað, at hetta uppskot vann ikki frama hjá táverandi landsstýri.

Annars hava vit fingið váttað frá serfrøðingum í danskari fyrisiting, at tá eitt fólkatingsár endar, verður »talvan vaskað rein« viðvíkjandi øllum lógar-»initiativum«. Tá falla øll initiativ burtur og mugu reisast av nýggjum, um tey skulu fremjast.

Tað er niðurstøðan tann, at sambært donskum fyrisitingarpraksis var einki initiativ á hesum økinum, tí »initiativið« frá 1991 fekk lutvíst ikki undirtøku í landsstýrinum, og lutvíst fall tað burtur, tá tingsetan 1991/92 var av.

c) Annars vilja vit vísa á viðmerkingarnar til lógaruppskotið, sum vísir, hvussu »væl« tað er undirbygt.

Váttað verður, at umsitingin ikki eingang hevur roknað uppá uppskotið. Talan er eisini um beinleiðis skeivar upplýsingar, tá sagt verður, at útróðrarbátar longu eru undir uppskotnu skipanini.

Her er bert talan um útróðrarbátar undir 20 tons. Og tá henda skipan var innførd fyri teir, var talan um ein bata í mun til ta skipan, sum var framman undan.

Tað er eisini átaluvert, at ikki verður upplýst í viðmerkingunum, at uppskotna lógin kemur at merkja, at forskotsskipanin hjá stórum parti av langfaraskipunum kemur at falla burtur. Tað einsamalt er nóg mikið til, at hesi skip koma at liggja.

Vit vilja leggja afturat, at tað sjónarmið hevur verið frammi, at framlagda uppskotið skal koma at útvega fleiri fiskimonnum arbeiði, tí við uppskotnu skipanini koma fiskimenn at fara í land og lata aðrar sleppa framat, tá teir hava forvunnið »nóg mikið«.

Nú er tað soleiðis, at hetta longu verður gjørt í ein vissan mun. Men hinvegin kunnu vit geva tilsøgn um, at um landsstýri og løgting veruliga vísa vilja til at útvega arbeiðspláss til fleiri fiskimenn, vilja vit beinanvegin fara í gongd við at kanna, um í hvussu stóran mun tað ber til at útvega fleiri arbeiðspláss um borð á verandi skipum við eini fastari vaktarskipan sum t.d. tveir túrar um borð og ein í landi. Og vilja vit taka samráðingar upp við avvarðandi partar um eina slíka skipan.

Annars halda vit sum sagt, at løgtingið verður misbrúkt í hesum máli, og eigur tað at vísa lógaruppskotinum aftur.

Við heilsan

Føroya Fiskimannafelag
f. Óla Jacobsen, formann
Olaf Johansen

Viðmerking til fundin á Bacalao


Í Sosialinum týsdagin 26da oktober stendur grein við yvirskriftini »Sorgarløta á Bacalao«. Eitt av brotunum í greinini ber heitið »Havnarpolitikarar ikki stuðlað nokk«, har stovnararnir siga seg vera vónsviknar av manglandi áhuga hjá politisku myndugleikunum í býnum. Hesum má eg sum býráðsformaður vísa aftur, tí hetta er als ikki í samsvar við veruleikan.

Bacalao og virksemið har hevur verið nógv umrøtt millum politikararnar. Øll hava vit verið samd um, at tað hevði verið ein ólukka fyri Havnina, um virksemið steðgaði upp.

Ógvusligu broytingarnar, sum fara fram í okkara samfelag í hesum døgum, raka eisini okkara býy og harvið býráðið. Hetta leggur tungar byrðar og skyldur á okkum, sum eru sett at umsita og stýra tí sindri, vit enn hava eftir at umsita og stýra, og tí skulu vit ansa sera væl eftir og vera varin í hesum tíðum.

Sum eitt dømi um, hvat er hent, kann eg nevna í hesum sambandi, at býráðið t. 19. desember 1991 á eykabýráðsfundi samtykti at veita eitt lán uppá 2 mill. kr. til m/tr »Beinir«, fyri at hjálpa Bacalao.

Eykabýráðsfundur varð eisini hildin 30. december 1992, tá býráðið annars skuldi hildið jólafrí, har samtykt varð at stuðla p/f Bacalao í royndunum at fáa part av hækkaðu kvotuni í Barentshavinum, fyri at økja um virksemið á Bacalao.



Seinni kom umbøn frá p.f. Coldstream undir stovnan um hjálp til figging av rávørukeypi og liðugtvørum á goymslu móti trygd í rávøru.

Býráðið hevði drúgva viðgerð av málinum, tí figgjarligu umstøðurnar versnaðu alsamt. Óttin hjá nógvum býráðslimum var grundaður á, at vandi var fyri at missa pengarnar, soleiðis sum umstøðurnar vóru brovttar innan flakavinnu og flakavirkir í landinum.

Í juni mánaða var fundur í býráðssalinum, har umboð fyri p/f Coldstream kundu greiða frá og svara spurningum frá býráðslimum. Leiðslan hjá Bacalao veit væl, m.a. útfrá hesum fundi, at tað var ikki tørvandi áhugi frá býráðnum, sum har kom fram.

Seinni broytti leiðslan hjá Bacalao støðu, og sakførari felagsins broytti umsóknina til í staðin at umfata eitt lán uppá 1 mill. kr. til m/tr »Brestir«, við tað at vandi var fyri at missa skipið, og at teir høvdu tilboð um sanering og umfigging, ið var treytað av innskoti frá aðrari síðu at teir bóðu um eitt lán uppá 1 mill. kr.

Aðrenn býráðið náddi at taka endaliga stað, (og tað var ikki tí, at fundir ikki vóru hildnir um málið) kom brævur landsstýrinum, dagfest 20.08. 1993, har boðað verður kommunum frá, at »Landsstýrið um fjølmiðlarnar er gjørt vart við, at Tórshavnar kommuna umhugsar at veita lán til privata vinnufyritøku...«, og brævið endar soleiðis: »Landsstýrið hevur tí á fundi í dag viðgjørt henda spurningin, og hevur avgjørt at boða kommununum frá, at kommunurnar kunnu ikki veita lán til privata vinnulívið«.

Soleiðis endaði viðgerðin av hasari umsóknini.

Tað er harmiligt, at leiðslan á Bacalao ber boðini til arbeiðsfólkið seinasta arbeiðsdagin soleiðis, at tað sær út sum um Tórshavnar Býráð **kundi havt hjálpt, men vildi ikki!**

Eisini eigur at nevnast, at í flestu kommunum hava flakavirkini goldið vatngjald, meðan hetta ikki er komið uppá tal í Tórshavnar kommunu, sjálvt um talan hevur verið um tríðingin av vatnnýtsluni í kommununi.

Tórshavn 28.10.93
Lisbeth L. Petersen
býráðsformaður

Sinnisbati
Fritíðarhølið í Krossgøtu 15 er opið mánakvøld kl. 19–22.

Amnesty International
Skrivstovan í Vágsbotni er opin mánadag, týsdag og mikudag kl. 10–16. Tlf. 15816.